# Telving á Sandoynni

**Síðani novembur hevur Mogens Nielsen havt regluliga talvundirvísing fyri børn á Sandoynni. Áhugin hevur verið sera stórur**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Mogens Nielsen er vælkendur í føroyska talvumhvørvinum. Síðani 1997 hevur hann meira ella minni verið partur av øllum altjóða kappingum í Føroyum, eins og hann hevur høvuðsdómari í FM-einstaklingakappingini síðani 2001.

Danski altjóða talvdómarin hevur eisini ein stóran áhuga í at menna føroyska telving. Síðani novembur hevur hann búð á Sandi. Sjálvur er Mogens ovfarin og frøist yvir, at umleið 80-90% av øllum børnunum á Sandoynni hava verið til talvfrálæru hansara. Mogens er útbúgvin fólkaskúlalærari og brúkar tí allarhelst góðar metodur at gera talv spennandi fyri børnini. Í øllum førum er barnatelvingin ein stór succes og opnar hurðina fyri framtíðar talvvirksemi á Sandoynni.

Orkufreki danin hevur regluligar undirvísingar í teimum stóru bygdunum, Sandur, Skopun og Skálavík.

Um tiltakið er komin í eina fasta legu, er ikki greitt. Tað er upp til mentamálaráðið, kommununar á Sandoynni og Talvsamband Føroya. Vónandi kunnu hesir bólkar framhaldandi finna semju um slóbrótandi samarbeiðið, eisini eftir summarferiuna

**Kring landið**

Seinastu vikurnar hevur barnaherurin hjá Mogens verið í Vestmanna og seinast í Klaksvík og telvað kappingar. Foreldrini hava bakkað væl upp um tiltøkini og hava fleiri av teimum hava eisini verið við á ferðunum, sum hava eydnast stak væl.

Sí myndir og úrslit á www.faroechess.com. Næstu ferð vit væntandi koma at síggja til sandoyarbørnini, verður helst leygardagin, tá ein FM-liðkapping fyri børn verður á Eiði.

**Sigeman 2005**

Jan Timman (2607) og Krishnan Sasikiran (2642) vunnu Sigeman 2005. Báðir vórðu ósigraðir við 6,5 stigum av 9 møguligum. Serliga fyri Timman má úrslitið sigast at vera framúr. Hann hevur seinastu árini ligið og dvalst við 2600-markið, men við úrslitinum í Keypmannahavn hevur hollendski veteranurin nú umleið 2625.

Amerikanska talentið, Hikaru Nakamura (2657), endaði á triðja plássi, bert hálvt stig aftanfyri vinnararnir. Nakamura vil telva øll talvini heilt út og bjóðar tí aldrin javnleik, og roynir tískil altíð at fara kompromileyst eftir sigrinum. Nakamura er garanturin fyri undirhaldandi telving.

Danin Curt Hansen (2633) hevði eisini eina góða kapping, eins og Jonny Hector (2513) úr Svøriki. Tiger hinvegin hevði eina katastrofukapping við bert hálvumøðrum stigi.

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 GM Timman | 2607 | 6,5 |
| 2 GM Sasikiran | 2642 | 6,5 |
| 3 GM Nakamura | 2657 | 6,0 |
| 4 GM C. Hansen | 2633 | 5,5 |
| 5 GM Hector | 2513 | 5,0 |
| 6 IM Palo | 2525 | 4,0 |
| 7 GM Iordachescu | 2609 | 4,0 |
| 8 GM Sune B. Hansen | 2553 | 3,5 |
| 9 IM Hermansson | 2432 | 2,5 |
| 10 GM Hillarp-Persson | 2533 | 1,5 |

# Súkklulandsliðið úttikið



*Nú er greitt, hvørjir fimm súkklarar skulu umboða Føroyar á komandi oyggjaleikum í Hetlandi*

**Um vikuskiftið varð kappast um tey fimm plássini á føroyska oyggjaleikalandsliðnum**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Kappast varð í somu greinum, sum verða á Oyggjaleikunum. T.v.s einkultstart, býarkoyring og landavegssúkkling.

**Gunnar hinir**

Tað varð Gunnar Dahl-Olsen, sum gjørdist stóri vinnarin, tá kappast varð. Á einkultstarinum gjørdist talan um tryggan sigur, men bæði í landavegs- og býarkoyringini gjørdist talan um tættir endaspurtir.

Plássið hjá Gunnari á landsliðnum varð tí at kalla sjálvskrivað, og afturat sær hevur hann fingið eina blanding av bæði royndum og óroyndum. Bogi Kristiansen, sum fyri fýra árum síðani vann bronsu í býarkoyringini, verður aftur hesaferð partur av landsliðnum, og tað sama verður Eli Kristiansen. Hartil eru Christian Guttesen úr Norðdepli og Esmar Joensen av Hvítanesi við.

Venjarar hjá landsliðnum eru Geyr Gilsteinsson, og Gunnar Dahl-Olsen, og teir fara nú við hópinum á venjingarlegu í Danmark. Umframt venjing fer landsliðið á ferðini eisini at taka lut í kappingum í einkultstarti og landavegskoyring.

# Sviar bjóða av í Ishøj

**Talan verður helst um størstu regattuna, sum higartil hevur verið í Ishøj, tá Færøregatta 2005 verður á skránni**

REGATTA
*Jákup Mørk*

Í ár er tað nevnliga so, at Køge bugt Strandpart – har regattan verður hildin – hevur 25 ár á baki, og tí hevur kommanan í Keypmannahavn eisini fleiri tiltøk á skránni. Í Róðrarfelagnum Neystið vóru tey skjót at taka av hesum møguleikanum, soleiðis at eyka fokus kundi fáast á árliga tiltakið, har føroysk mentan í breiðum høpi er við til at seta dagsskránna.

**Sviar bjóða av**

Og tað eru ikki bara danir, sum hava sýnt tiltakinum ans. Sviar hava boðað frá, at teir í ár ætla sær at taka lut í kappróðrinum, og at føroyingar tí als ikki skulu kenna seg ov tryggar í hesum. Heldur ikki, hóast talan er um kappróður í føroyskum bátum. Nakað sum veteranarnir úr Havnar Róðrarfelag tó helst eru rúkandi ósamdir í. Teir hava aftur í ár boðað frá luttøku, og sum vant, so er tað við sigrinum fyri eyga, at teir fara undir róðurin, skilst.

Magni ger comeback

Um sjálva skránna er annars at siga, at hon í ár er sera fjølbroytt. Lagt verður fyri longu fríggjadagin, tá Guðrun Sólja Jacobsen og Showmenn fara at undirhalda í tjaldinum, sum er sett upp, og fyrireikararnir rokna við, at tað longu tá verður nógv fólk savnað.

Leygardagin verður so farið undir sjálvt regattatiltakið. Har verður talan um listaframsýning og skrúðgongur, og eftir skrúðgonguna verður tað danski innlendismálaráðharrin, Lars Lykke Rasmussen, sum fer at seta stevnuna.

Sjálvur kappróðurin er á skránni kl. 14, og at siga frá hesum er gjørt rúm fyri einum stuttum come-back í frásøguleiklutin til stjóran í Atlantic Airways, Magna Arge.

Síðani gongur dagurin sína vanligu leið, og um kvøldið verður so dansur, sum á midnátt verður avbrotin av midnáttarsangi, soleiðis sum tey flestu kenna tað frá ólavsøkuni.

Heilt endalig er skráin ikki enn, men sum skilst, so verður talan um rættiligt familjutiltak. Skattajagt, andlitsmáling og ítriv av ymsum slag verða á skránni til børnini. Á heimasíðuni, www.neystid.dk, ber annars til at frætta meira um tiltakið, so hvørt sum fyrireikingarnar gerast meira endaligar.

# Talvið hesa vikuna

IM Palo,D (2525) — GM Nakamura, H (2657)
13th Sigeman & Co Copenhagen/Malmø (9), 24.04.2005

1.d4 Rif6 2.c4 Ric6 3.Rif3 e6 4.Bf4 d6 Nakamura telvar mangan óvanligar byrjanir. Eitt nú spældi hann 1. e4 e5. 2. Fh5!? í talvinum móti Sasikiran! Nakamura tapti tað talvið... 5.Ric3 g6 6.e4 Bg7 7.Be2 0—0 8.0—0 Rid7 9.Bg5 f6 10.Be3 Rie7 11.Fb3 Kh8 12.c5! Palo mátti vinna hetta talv fyri at fáa sín triðja og seinasta GM-norm. Higartil sær tað gott út hjá honum 12...f5 13.Rig5 Rib8 14.f4?! Her kundi Palo gera sær dælt av betri støðu sínari: 14.Rixe6! Bxe6 15.Fxe6 f4 16.Bc1 Bxd4 17.cxd6 cxd6 18.Rib5 var ein betur og helst vinnandi roynd 14...fxe4 15.Ricxe4 Ribc6 16.Rad1 Rid5 17.cxd6 cxd6 18.g3 Rixe3 19.Fxe3 Fb6 Knappliga hongur svarta støðan væl saman 20.Rif3 Rie7 21.Rd2 Bd7 22.Re1 Rae8 23.Fb3 Fc7 24.Bf1 Rif5 25.Ric3 Bc6 26.d5 exd5 27.Rxe8 Rxe8 28.Rixd5 Fa5 29.Fc4 Rie3! Bxb2 vinnur eisini, men hesin leikurin skræðir eisini hvítu støðuna sundur 30.Rixe3 Rxe3 31.Rig5 h6 32.Rif7+ Kh7 33.Rxd6

Støðumynd



Støðan eftir 33. Rxd6

33...Fb6! Hvítur gavst 0—1